# EIÐIS SKÚLI

Kolsvegur 8 · Postrúm 29 · FO-470 Eiði
Heimasíða: www.eidisskuli.fo

## Søkt verður eftir lærara til Eiðis skúla

- 1 tíðaravmarkað starv fyri lærara í farloyvi skúlaárið 2008/2009.

**Tann, ið settur verður skal:**

- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

Skúlanum tørvar lærara, ið kann átaka sær at undirvísa í hesum lærugreinum :

Føroyskt 3./4. fl., Enskt 7. fl., Føroyskt 7. fl. Serundirvísing. Tann, ið settur verður, skal røkja flokslærarauppgávuna í 7. flokki. Harumframt er ynskiligt, at viðkomandi kann taka sær av bókasavninum. Talan er uml. 23 undirvísingartímar og 3 bókasavnstímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett 1. september.

**Førleikakrøv:**
Ynskiligt er, at tann, ið settur verður hevur lærara-útbúgving. Tó eru onnur vælkomin at søkja.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira kann fáast at vita um starvið frá fyrstalæraranum Tom Joensen á tel. 22 90 45.

Umsóknir, saman við c.v. og prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 31.juli 2008 kl. 12.00.

EIÐIS SKÚLI
POSTRÚM 29
470 EIÐI

**Eiðis skúli** hevur undirvísing í 1. – 7. árgangi. Skúlin er væl útgjørdur við serstovum, lærarahølum og ítróttahøll. Hevur góðar umstøður til næmingar og lærarar. Í skúlanum starvast 9 lærarar og 2 stuðulsfólk. 80 næmingar eru í Eiðis skúla. Les meira um okkum á www.eidisskuli.fo

# BINDIBÚÐIN

**Starvsfólk til Bindibúðina í SMS!**

Søkt verður eftur starvsfólki til farloyvi 30 tímar um vikuna.

Hevur tú hug at arbeiða hjá okkum?

Tú ert kreativur, smílandi, kundarvinarligur, álítandi og fyrikomandi.

Hevur hetta tín áhuga, kann tú seta teg í samband við Eyð Skoubo, tel.315566 / 515566

Umsóknin skal vera okkum í hendi **innan 10.aug.**

SUNDA KOMMUNA

## Stuðulsfólk til Hvalvíkar skúla

Søkt verður eftir stuðulsfólki skúlaárið 2008/2009, til næming við serligum tørvi.

Starvið er 25 tímar um vikuna.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur royndir innan økið.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi **hósdagin 24. juli, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólgerð Foldbo, skúlastýrisformann, á telefon 591119.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Sólgerð Foldbo
Streymnesvegur 76
435 Streymnes

*Hvalvíkar skúli hevur komandi ár uml. 45 næmingar og 5 lærarar. Skúlin er ein 3-flokkaður skúli við næmingum í aldrinum 1.-7. flokk.*

UTTANRÍKISRÁÐIÐ

## Spennandi størv í Uttanríkisráðnum

Í Uttanríkisráðnum eru hesi størv leys at søkja:

- Deildarstjóri til umsitingardeild
- Skjalavørður
- Fulltrúi í havpolitikki
- Fulltrúi í handilspolitikki

Umsóknarfreistirnar eru mánadagin 11. august 2008.

Meira er at frætta um størvini á heimasíðuni hjá Uttanríkisráðnum www.mfa.fo ella við at seta seg í samband við Joan Ólavsdóttir á telefon +298 351051.

# Kranaskeið D

(8-25 TM)

byrjar mánadagin 21. juli kl. 19.15 í Tórshavn
Tilmelding á tel. 21 62 22

**Vinnukortið**

TVØROYRAR KOMMUNA

# Pedagogur til Frítíðarskúlan í Trongisvági

Søkt verður eftir pedagogi til Frítíðarskúlan í Trongisvági at arbeiða 25 tímar um vikuna.

Starvið verður sett 18.08.08 ella eftir nærri avtalu

**Stovnslýsing:**
Frítíðarskúlin er normeraður til 40 børn í 1. 2 og 3. flokki. Hildið verður til í høli hjá Trongisvágs Skúla.

**Vit ynskja at tú:**

- hevur góð samstarvsevnir og ert álítandi.
- tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum.
- ert nærløgd/lagdur og vísir umsorgan.
- ert kreativ/ur.
- vísir áhuga og ynskir at mennast í arbeiðinum.
- ert opin fyri broytingum

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogur ikki fæst til starvið, verður hjálparfólk sett tíðaravmarkað ístaðin.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Siri Mortensen, leiðara, á tlf. 372750 ella 225894.

**Umsókn:**
Saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skulu verða Frítíðarskúlanum, FO-826 Trongisvágur í hendi í seinasta lagið 04.08.08.

**Tvøroyrar kommunu**
800 Tvøroyri



# Nissan Navara til sølu

Nissan Navara SE 2,5 dCi Double Cab (171 hk) 5-persóna bilur við last (skrásettur sum persónbilur). 17 mánaðar gamal. Skrásettur fyrstu ferð 30. januar 2007. Koyrt 25.900 km.

Bilurin er væl hildin og sera væl útgjørdur og hevur t.d. differentialesperru, krók aftan, krom el-síðuspegl, gáttir og er væl rustviðgjørdur.

Nýprísur kr. 442.000,-

**Til sølu fyri kr. 300.000,-**

**Tel. 581690**